## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Lot til andøvsgul av vestri og møguliga sirm um morgunin, men annars turt og sólglottar, tó mjørkaflókar. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi, seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og landsynningi og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 7 og 11 stig.

## DAGSINS FØROYINGUR

# »Deiligt at sleppa av við Dúgvuna«

**Sára Mikladal er 1. lærari á Husum og í Syðradali. Hon eigur og rekur handilin Sara í Klaksvík**

*Heini S. Kristiansen*
*Heinik@sosialurin.fo*




*– Vónar nógvar kundar nú tunnilin letur upp*

**■ Eitur handilin eftir tær?**
– Eg geri nógv ungdómsarbeJa, men eg havi valt at kalla hann Sara heldur enn Sára, fyri at handilin skal fáa ein meira altjóða dám.

**■ Stendur tú nógv í handilinum?**
– Fyrst og fremst eri eg lærari. Men eg standi her onkuntíð. Annars havi eg fólk í starvi eisini.

**■ Er tú spent til tunnilin letur upp?**
– Ja, tað verður deiligt, men tað besta verður at sleppa av við Dúgvuna. Eg eri so troytt av at standa í bíðirøð og verða noydd at sigla hvørjaferð eg skal okkurt.

**■ væntar tú fleiri kundar, nú tað verður ókeypis at koyra gjøgnum tunnilin í eina viku?**
– Tað koma uttan iva nógv fólk til Klaksvíkar, so eg vóni, at tað koma nógv inn í handilin hjá mær.

**■ Fylgir tú við KÍ?**
– Maðurin er aðalskrivari í FSF, so tað verður tosað nógv um fótbólt heima hjá okkum. Eg eri vælnøgd við úrslitini hjá KÍ higartil í ár. Eg vóni bara at góða gongdin heldur fram

**■ Hvørjum vil tú heilsa?**
– Eg vil fegin heilsa manninum, børnunum og vinfólkunum. Systir mín hevur eisini uppiborið eina heilsan

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | -4 |
| Qaqortoq | -1 |
| Ammassalik | -1 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 8 |
| London | 13 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 4 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 11 |
| Keypmannah. | 9 |
| Helsinki | 4 |
| Moskva | 11 |
| Berlin | 14 |
| Warzawa | 15 |
| Kiev | 19 |
| Bukarest | 13 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 19 |
| Róm | 18 |
| Malorca | 18 |
| Athen | 21 |
| Malta | 18 |
| Tunis | 21 |
| Beijing | 18 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | 27 |
| New York | 20 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 25 |
| Panama | -- |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 24 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1009 hPa. í landnyrðing úr Føroyum fer í landsynning og grynnist. Eitt hátrýst, 1029 hPa. vestan fyri Írland stendur mestsum í stað og mennist.




**Í dag:**
Millum lágtrýstið við Hvarvið og hátrýstið við Írland rekur lýggj luft av útsynningi móti Føroyum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 19/4 kl. 06⁰⁰– 20/4. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 0,6°
Minsti hiti máldur í apríl: -9,9° - Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,6 mm – mált frá 19/4 kl. 06⁰⁰– 20/4 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í apríl: 103,7 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

25. apríl Mánin næstur jørðini
27. apríl Tendring

Kelda. Almanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 27. apríl | 06.44 | 19.09 | 05.44 | 18.09 | 05.59 | 18.24 | 08.44 | 21.09 | 09.44 | 22.09 | 04.59 | 17.24 | 03.59 | 16.24 | 06.59 | 19.24 | 07.59 | 20.24 | 06.29 | 18.54 | 07.44 | 20.09 |
| 28. apríl | 07.35 | 20.02 | 06.35 | 19.02 | 06.50 | 19.17 | 09.35 | 22.02 | 10.35 | 23.02 | 05.50 | 18.17 | 04.50 | 17.17 | 07.50 | 20.17 | 08.50 | 21.17 | 07.20 | 19.47 | 08.35 | 21.02 |
| 29. apríl | 08.30 | 20.59 | 07.30 | 19.59 | 07.45 | 20.14 | 10.30 | 22.59 | 11.30 | 23.59 | 06.45 | 19.14 | 05.45 | 18.14 | 08.45 | 21.14 | 09.45 | 22.14 | 08.15 | 20.44 | 09.30 | 21.59 |
| 30. apríl | 09.27 | 21.55 | 08.27 | 20.55 | 08.42 | 21.10 | 11.27 | 23.55 | - | 12.27 | 07.42 | 20.10 | 06.42 | 19.10 | 09.42 | 22.10 | 10.42 | 23.10 | 09.12 | 21.40 | 10.27 | 22.55 |

I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI




**Vika 16 – 23. apríl**

1. Centrum:
**52 - 70 - 66 - 59 - 21 - 03 - 58 - 63 - 54 - 18 - 25 - 26 - 67 - 30 - 41**

1. Ramme:
**31 - 45 - 73 - 62 - 05 - 57 - 51 - 49 - 53 - 42 - 33 - 12 - 50 - 20 - 34 - 22 - 71 - 38 - 02 - 69 - 64 - 39 - 11**

Fuld plade:
**28 - 74 - 09 - 24 - 47 - 35 - 37 - 29 - 14 - 56 - 07**

Fri spil: **BO__N**

| | |
|---|---|
| Fuld plade: 1. pr. | **132.694,- kr.** |
| 1. Ramme: 2. pr. | **22.903,- kr.** |
| 1. Centrum: 3. pr. | **2.889,- kr.** |
| Ramme: 4. pr. | **345,- kr.** |
| Centrum: 5. pr. | **13,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum




## TIPS 12 úrslit
**Vika 16 – 23. apríl**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | AGF - AaB | x |
| 2. | Esbjerg - Viborg | 1 |
| 3. | FC Midtjylland - Brøndby | 1 |
| 4. | OB - Silkeborg | 1 |
| 5. | SønderjyskE - FC Nordsjælland | x |
| 6. | AB - Skjold | x |
| 7. | FC Fredericia - HIK | 1 |
| 8. | Kolding FC - Brabrand | x |
| 9. | K'ge - Fremad Amager | x |
| 10. | Lolland F.A. - Herfølge | x |
| 11. | Lyngby - Randers FC | x |
| 12. | Vejle - Frem | 1 |

**Prognosa:**

| | |
|---|---|
| 12 rætt: | **89.023,- kr.** |
| 11 rætt: | **3.589,- kr.** |
| 10 rætt: | **290,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

5 707265 100050 >